# 1050 úr Havn til Danmark

síða 5

tíðindablaðið sosialurin

7,-

Nr. 233 ★ týsdagur 7. desember 1993

## Beint norðanfyri Føroyar:

# Ein nýggjur loyni-krókur




*Bulgarsk og koreansk skip royna longu eftir makreli í Norskahavinum í altjóða sjógvi. Polsk, ukrainsk og sponsk skip eru á veg. Sildastovnurin er við at koma seg og tá rokna norðmenn við at fjarfiskafloti úr øllum heimi koma á piratveiðu Norskahavinum*

*síða 3*

## Alt ov fá vaktarfólk:

# Fløskusor í dansi í Gundadali

*síða 7*



## Seismikk-fyritøkan Geco-Prakla:

# Føroyska økið sera áhugavert

*– hóast jarðfrøðin er torfør at hava við at gera, siga umboð fyri fyritøkuna, tey hava vitjað í Føroyum*

*síða 6*

*Heimskenda seismikk-fyritøkan Geco-Prakla tann fyrsta á fund í Føroyum:*

# Føroyska økið sera áhugavert



*Martin Heinesen, jarðfrøðingur tosar við Terje Nikolavsen frá Geco-Prakla. Judit Neis er "headhunta" úr Skotlandi at vera ráðgevi hjá føroyskum myndugleikum í hesi so týðandi fasuni. Mynd kalmar*

## *-hóast jarðfrøðin er torfør at hava við at gera*

Í gjár byrjaðu samráðingar í Havn millum føroyskar myndugleikar og útlendsku seismikkfeløgini. Tað er oljuráðleggingarnevndin, sum hevur boðsent fleiri av teimum størstu og mest kendu seismisku feløgunum í heiminum at tosa um tær komandi kanningarnar á føroyskum øki.

Fundirnir eru í Nóatúni og hava føroyingar brynjað seg væl út. Umframt Martin Heinesen og Stefan Hultberg, jarðfrøðingar eru eisini Arni Olafsen og Halgir W Poulsen við á hesum byrjandi fundunum. Somuleiðis skrivarin hjá oljuráðleggingarnevndini. Tina Hansen.

Haraftrat hevur nevndin heitt á eitt kent navn í sambandi við ráðgeving innan oljuvinnu at vera ráðgevi okkara. Tað er Judith Neish, sum er sera høgt í metum millum oljutólk.

A fundinum gjáramorgunin møttu tvey umboð fyri eina ta størstu seismisku fyritøkuna í heiminum. Geco-Prakla. Tey vóru bretin Peter Philip, sum áður hevur vitjað í Føroyum og norðmaðurin Terje Nikolavsen.

Eftir fundin spurdu vit teir báðar, hvat teir vænta at fáa burtur úr fundunum her?

-Vit halda, at hetta er eitt sera áhugavert øki at kanna og sjálvandi vóna vit, at føroyingar kunnu fáa gleði og gagn av okkara drúgvu royndum. Hóast oljuprísirnir eru sera lágir í løtuni, so halda teir kortini føroyska økið vera sera áhugavert. Teir vísa á, at tað er sera ilt at meta um, hvussu prísirnir verða um 5 ella fyri tað 10 ár.

-Ætla føroyingar at seta skjøtil á, so má ein byrja fyrr ella seinni, og hví ikki nú.

Teir upplýsa, at teir á fundinum við føroyingar hava tosað um ymsar møguleikar og ein teirra er at byrja kanningarnar komandi summar.

Geco-Prakla fyritøkan hevur ein týðandi leiklut í teimum kanningunum sum hava verið gjørdar bretsku megin miðlinjuna millum Føroyar og Hetland, so teir hava rættiliga nógvan kunnleika til økið.

*-Er økið ikki so mikið stórt, at tað rætta er at láta fleiri fyritøkum arbeiðið?*

-Økið er sera stórt og vit hava okkara hugsan um, hvussu hetta kann gerast, men tað er upp til føroyskar myndugleikar at meta um hetta.

*-Nú hava tit gjørt kanningar nógva staðni í heiminum. Hvussu meta tit Føroyaøkið í mun til onnur øki?*

-Tað er sera áhugavert, men tað er eisini eitt sera trupult øki jarðfrøðiliga.

Geco Prakla ger í løtuni seismiskar kanningar í Falklandsoyggjunum. Peter Philip sigur, at tað enn er ov tíðliga at siga nakað um møguleikarnar har, men tað sær ljóst.

Eftir fundin hittu vit eisini Judith Neish, sum Oljuráðleggingarnevndin hevur sett sum ráðgeva, nú teir fyrstu fundirnir eru við seismisku feløgini. Hon kemur úr Skotlandi og heldur, at hetta er ein sera spennandi uppgáva. Hon hevur útbúgving innan matematikk, geologi og fysikk. Sjálv hevur hon drúgvar royndir frá oljuvinnuni, har hon arbeitt í ikki minni enn 20 ár.

-Eg haldi, at hetta er ein sera sera spennandi uppgáva, hóast hon ikki er einføld.

jan



*Tey bæði umboðini hjá Geco-Prakla Peter Philið og Terje Nikolavsen eftir fundin í gjár við føroysk umboð*

*Fyrilestur mikukvøldið 8. des. kl. 20.00:*

## »Oljuleiting í føroyskum øki«

*Mikukvøldið 8. des kl. 20.00* heldur Jørgen Nørgaard, deildarstjóri í danska orkumálaráðnum, fyrilestur í røðini »Føroyar ár 2000« á *Fiskirannsóknarstovuni í Nóatúni* við heitinum **»Oljuleiting í føroyskum øki«**.

Í hesum fyrilestri dregur Jørgen Nørgaard upp fyritreytirnar fyri oljuvirksemi á føroyska landgrunninum. Tey, ið teika á altjóða oljupallinum, tey stóru oljufeløgini og rannsóknarvirki teirra, verða umrødd. Eisini verður støðan lýst, um olja verður funnin, sum kann verða gagnnýtt. At enda verða drigin fram serliga tey krøv, metingar og vegar fyri og ímóti, sum oljuleiting og møgulig framleiðsla setir føroyskum myndugleikum og føroyska samfelagnum.

Fyrilesturin er almennur.

**Fróðskaparsetur Føroya**
**Føroya Fróðskaparfelag**


## Toytota Carina

– nakað tilkomin, men í sera góðum standi, til sølu fyri kr. 7.000,-.

Tlf. 18951